# varð bumbaður við Lincoln City



*Mamma Frank, Sunneva, eygleiddi bumbingina av pápa hansara*

aftur til Bretlands við HMS Aurora, har hon skuldi fáa álagt nýggjar uppgávur.

Francis sendi Sunnevu fleiri brøv, og greiddi frá, at hann var so langt burtur. Men hann vildi koma aftur! Men tað kom hann ikki, og sum frá leið frættist heldur ikki meira frá honum. Hon man neyvan hava vitað, at hann var giftur.

**Missir mammuna**

Frank varð so føddur 26. september 1941 í Havn. Hann og mamman fluttu so vestur í Vágar inn til ommuna og abban, og hjá teimum er Frank eisini vaksin upp.

Frank fekk at vita sum 7-8 ára gamal um pápa sín. Hetta gjørdi hann sjálvsagt nakað øðrvísi enn hini børnini, sum búðu saman við pápa og mammu. Tað eru frásagnir um, at børn hjá bretskum hermonnum hava verið happað vegna sín uppruna. Hetta kennir Frank eisini nakað til. Hann sigur, at hann var nakað happaður av hinum dreingjunum, tá ið onkur tvístøða kom í. Men ofta var tað meira av teimum vaksnu.

Umstøðurnar vóru heldur ikki tær bestu. Tað hevur ikki verið lætt at verið einlig mamma tá í tíðini. Frank minnist, at barnapeningurin, sum mamman fekk, var kr 258 um hálvárið. Víst hevði henda upphædd størri virði tá enn nú, men hetta var ikki nógv til at forsyrgja einum barni.

Mamman fekk eina harða lagnu. Hon giftist í 1950 og fekk fyrst tvey børn høvd í høvd. Í januar 1953 doyði hon í barsilssong við tvíburum, bert 38 ár gomul. Hesi fýra børnini fóru til onnur at vera, meðan Frank var eftir hjá ommuni og abbanum, har hann hevði tað gott.

**Fekk samband við pápan á Malta**

Alt hetta ger trongdina at vita um pápan enn størri. Ein dagin fann Frank eitt bræv til mammuna í skuffuni hjá abbanum. Tað var frá ríkisumboðnum, har tey bóðu um adressuna hjá pápa hansara.

Tá setti Frank í seg, at nú skuldi hann royna at fáa samband við pápan. Hann kendi ikki adressuna, men hann visti navnið á honum. Frank sendi tískil bræv í hansara navni til krígsmálaráðið í London. Hetta var í 1961, tá Frank var 20 ára gamal.

Tað gingu bert nakrar fáar vikur, tá fekk hann svar aftur. Pápin hevði svarað aftur beinanvegin. Men postsambandið tá gjørdi sjálvsagt, at tað tók longri tíð hjá brøvum at koma fram enn nú á døgum.

Pápin greiddi frá, at hann tá var á Malta, har hann var politistjóri á Naval Base, sum var ein bretsk herflotastøð. Malta var tá framvegis undir bretskum ræði. Pápin greiddi frá, at hann var giftur, og at hann átti trý børn, sum vóru fødd í 1932, 1935 og 1938.

Teir skrivaðu saman í eini 10 ár. Tað var eitt sindur trupult at samskifta. Frank dugdi ikki enskt tá, so tað vóru lærararnir í Sørvági Leif Nolsøe og Tóri Skaalum, sum førdu pennin fyri hann.

Pápin legði upp til at møtast, men ikki kom uppskot um hvar og nær. Kanska hevur tað hildið honum aftur, at hann hevði eina familju, sum einki visti um hansara føroyska samband.

Sambandið fánaði burtur. Frank fekk eisini annað at hugsa um, hann hevði eisini fingið konu og børn. Hann giftist við Anni, og tey fingu tilsamans sjey børn, fimm av teimum eru á lívi.

Men Francis gloymdi kortini ikki síni í Føroyum. Hvørji jól sendi pápin 20-25 pund til abbabørnini. Hetta var fitt av peningi tá.

Men Frank hugsaði kortini alla tíðina um, hvar pápin mundi vera, og hann tráaði eftir at fáa samband við hann aftur.

Fyrst í 90-unum fór Frank so at forhoyra seg aftur. Dóttir hansara, Sunneva, kontaktaði Metropolitan, politistøðina í London.

Frank fekk sum svar, at pápin hevði arbeitt hjá politinum til 1959. Síðan hevði hann verið fýra ár á Malta. Frank fekk fatur í hansara seinastu adressu, men hon var ikki til nakra hjálp. Eisini fekk hann at vita, at pápin doyði í 1982. Meira hevði politistøðin ikki loyvi til at siga honum.

**Fekk trý systkin eftir einum degi**

Tíðin gekk, og hetta við pápanum og hansara familju var framvegis í huganum.

Men nú er tað nakað sum eitur internet, og sum ger alt so nógv lættari. Siri, dóttirin, setti seg við telduna at leita. Hon kom inn á eina ættarheimasíðu, og har fann hon trý nøvn sum tí hjá pápa hansara. Eftirnavnið Seward man hava verið nakað sjáldsamt. Teldubræv verður so sent til sonin hjá Francis Seward. Sent var til ættina hjá tí við hesum navni, sum var føddur í 1908. Frank visti at pápi hansara var føddur hetta ár.

Sonurin eitur eisini Frank. Hann fær sum rímiligt er ein kvøkk, tá ið hann fær teldupost frá einum púra ókendum Frank, sum sigur seg vera beiggja hansara.

Hann váttar í svarinum, at hann er sonur Francis Albert. Hann veit ikki annað, enn at pápin átti bert seg og tvær systrar. Hann spyr, hvat ið fær Frank til at halda, at pápi sín eisini er pápi hansara. Síðan spyr hann, nær Frank er føddur, og hvør mamman var. Frank svarar sama dag, og dagin eftir kemur svar frá enska Frank.

Nú sæst, at hann er spentur uppá hetta, og hann dugir væl at síggja, at tað kann vera rætt, at teir hava sama pápa. Eisini sigur hann seg og sínar systrar vera hugtikin av hesi søgu um, hvussu Frank hevur funnið fram til fyrst pápan og síðan til teirra. Hann er eisini so umhugsin, at hann spyr eftir mammu Frank. Seinni harmast hann um, hvussu illa tað gekk henni. Hann greiðir frá tí, hann veit um pápan í Føroyum og greiðir eisini frá sær sjálvum og sínum systrum, sum nú eisini eru spentar uppá hendan nýggja beiggjan.

**"Welcome half brother"**

Hann vil fegin frætta aftur og undirskrivar teldupostin "welcome half brother."

Teir halda so fram við teldupostum at greiða frá sínum egnu søgum.

Tað vísti seg eisini, at pápin hevur havt eina sera dramatiska søgu undir krígnum.

Sonurin greiðir frá, at tey heima høvdu bert sæð hann tvær ferðir øll bardagaárini. Onnur ferðin má so hava verið, tá ið hann kemur heim úr Føroyum. Men eingin fekk at vita um nakað samband við føroyska gentu.

At hetta samband hevur havt fylgir, visti hann sjálvur ítøkiliga í hvussu er í 1961, men hann hevur einki fortalt heima. Hann hevur vist eisini følt seg illa um lagnuna hjá gentuni, sum hann fekk barnið saman við. Frank í Onglandi heldur tó, at mamman kann hava vitað okkurt, sum hon ikki hevur fortalt børnunum. Tey bæði høvdu felags peningakonto, og hon má hava varnast barnapengarnar, sum fóru av kontoini tvær ferðir árliga. Tey kunnu hava hildið, at tað var ov eyðmýkjandi at fortelja børnunum hetta.

*framhald á næstu síðu*



*Endiliga saman! Frá vinstru hálvsystirin Gillian. Frank og konan hansara Anny, og hálvbeiggin Frank Seward. Innsetta myndin er systirin Rosemary*